MENTAN

SAMBAND
ANNA W ELLINGSGAARD@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Savnið hevur stóran týdning, í fyrsta lagi, tí at hesi fínu listaverkini verða varðveitt og savnað og fáa góðar karmar, men eisini tí, tað hevur stóran uppalingarligan týdning, at hava eitt savn at vitja regluliga.*

*Súsan í Jákupsstovu, dagligur leiðari*

# Ein stórur dagur fyri Sands bygd

**Á móttøku leygardagin varð Sands Listasavn tikið í nýtslu, við klassiskum tónleiki, røðum og avdúking av bringumynd, ið listamaðurin Hans Pauli Olsen hevur gjørt av manninum handan savnið Sofusi Olsen**

MÓTTØKA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at Sands Listasavn lat upp á fyrsta sinni í vikuskiftinum, var samkoma fyri innbodnum í Listasavninum leygardagin. Millum tey innbodnu vóru listafólk, hvørs verk prýða veggirnar á savninum, vinir og skyldfólk hjá manninum, ið hevur bygt savnið og savnað listina, ið hongur í tí, Sofusi Olsen, umframt umboð fyri stuðlar og fjølmiðlar. Heilt fitt av fólki var á samkomuni, ið var sera hugnalig.

Sofus Olsen legði fyri við at bjóða fólki vælkomnum, og takka teimum, ið høvdu hjálpt honum við at útinna hesa verkætlan. Her nevndi hann arkitektin Palla Gregoriussen, byggifelagið Articon og serliga Jón Danielsen stjóra í byggifelagnum, Sands Bygdaráð og Mentamálaráðið, ið hava stuðlað við eini upphædd.(blðm: ið svaraði til MVG'ið, ið skuldi rindast av byggingini). Listamenninir, ið høvdu hjálp Sofusi við at heingja myndirnar upp vórðu eisini nevndir, umframt Karin Kjølbro, ið hevur hjálpt Sofusi sera nógv seinastu mánaðirnar við at fyririeka upplatingina, og tað tyktist tí eisini sera hóskandi, at Karin Kjølbro helt sjálva upplatingar røðuna.

Men áðrenn Karin slapp framat, spældu Heiðrunn Petersen og Grímur Mortensen úr Tórshavnar Musikkskúla verk av Händel eftir ynski av Sofus. Tey bæði spældu yndisligt, og vístu enn einaferð hvussu góð musikkskúlaskipanin í Føroyum er.

Karin Kjølbro helt síðan røðu sína, ið var tíðum stuttligt, tíðum rørandi og alla tíðina sera góð. Hon nam við lívsleiðina hjá Sofusi, hesum stóra slóðbrótara og dyggasta stuðli hjá føroyskari list. Hon nam við søguna og støðuna hjá Sands bygd, sum eini av elstu bygdum í Føroyum og heimstaður fyri nógv serlig fólk. Eisini avdúkaði Karin, at í samstarvi við Sjónvarpi Føroya hevði hon fingið í lag, at ein sjónvarpsfilmur verður gjørdur til listasavnið. Ein filmur, ið m.a. vísir hvussu listin hekk í heiminum hjá Sofusi og Gunnhild við Tinghúsvegin í Havn. Hetta tyktist at vekja gleði millum gestirnar, og tað er gleðiligt at eisini Kringvarpið hjálpir at varpa ljós á hetta stórsligna savn og mannin, ið stendur aftan fyri gávuna til Føroya fólk. Karin segði harumframt, at hon hevði savnað frásagnir hjá Sofusi og frágreiðingar, ið hann hevði skriva niður, og at ætlanin var, at hesar skuldu savnast í einum skápi í Listasavninum. Eftir røðuna varð bronsu bringumyndin av Sofusi, ið listamaðurin Hans Pauli Olsen hevur gjørt avdúka. Tað vóru tær báðar Annika Poulsen ommudóttir Gunnhild konu Sofusar og skyldkona Sofusar og Jóna Thomsen, ið avdúkaðu bringumyndina.

Eftir enn eitt tónleikastykkið av Händel tóku borgarstjórin á Sandi Páll á Reynatúgvu og Landstýrismaðurin í Mentamálum Jógvan á Lakjuni orðið og fegnaðust báðir um hesa stóru gávu.

Sands bygdaráð hevði skipað fyri, at pinnamatur og okkurt at drekka var til gestirnar, og eftir samkomuna bjóðaði borgarstjórin okkum til hugnaligt borðhald í Ungmannafelagshúsinum.

Hetta var ein stórur dagur í søguni hjá Sands bygd, hjá Sandoynni og hjá føroyingum sum heild. Eins og Mærsk McKinney Møller gav danska fólkinum eitt operahús, hevur Sofus givið føroyingum eitt frálíkt listasavn.



*Sofus Olsen stóð við bringumyndini, ið Hans Pauli Olsen hevur gjørt av slóðbrótaranum. Sofus Olsen legði fyri við at bjóða fólki vælkomnum, og Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, var millum røðararnar.*



*Karin Kjølbro rørdi og undirhelt gestirnar við eini frálíkari røðu.*



*Sofus Olsen takkaði tónleikarunum úr Musikkskúlanum fyri vakra tónleikin*



*Jóna Thomsen og Annika Poulsen avdúkaðu bringumyndina av Sofusi Olsen*



*Millum tey innbodnu vóru listafólk, vinir og skyldfólk hjá Sofusi Olsen, umframt umboð fyri stuðlar og fjølmiðlar*

## Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi:

## – Sands Listasavn týdningarmikið fyri Sandoy

Borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu, heldur, at Sands Listasavn hevur stóran týdning fyri øll á Sandoynni:

– Sands Listasavn hevur stóran týdning fyri øll, ið liva og virka á oynni. Fyrst og fremst er listasavnið avgjørt vert at vitja, og somuleiðis dregur savnið nógv ferðafólk henda vegin.

– Tað er ein stór styrki hjá okkum at kunna vísa á, at vit veruliga hava ein mentanargrip her, ið er verdur hjá øllum at síggja. Men somuleiðis er hetta ein nýggj leið í tilveruni hjá sandingum.

– Á henda hátt fáa øll á Sandoynni størri ans fyri list og mentan, sigur Páll á Reynatúgvu og skoytir uppí, at listasavnið er ein framúr góð gáva frá Sofusi Olsen:

– Eitt ævintýr er í dag vorðin veruleiki, sigur hann.

**- horsdal**



*Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi*